Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Móttøka fyri trimum stovnum



*Fríggjadagin 3. mars var almenn móttøka í R.C. Effersøesgøtu 30 í Havn*



*Eyðun á Lakjuni, býráðslimur í Fuglafirði, Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavíkar kommunu, og Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu*



*Katrin Dahl Jacobsen, býráðslimur, og Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu, og Ingibjørg Berg aðalskrivari hjá Kommunusamskipan Føroya*



*Frá móttøkuni, fremst á myndini er Anna Dam, leiðari á Barnaverndarstovu Føroya*



*Nógv fólk vóru til móttøkuna hjá teimum trimum stovnunum. Fremst á myndini er Boje Christensen, borgarstjóri í Kvívík*



*Jacob Vestergaard landsstýsismaður heldur røðu*

**Fríggjadagin 3. mars var almenn móttøka í R.C. Effersøesgøtu 30 í Havn í sambandi við at Kommunusamskipan Føroya og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya vóru flutt í nýggj hølir og Barnaverndarstova Føroya, sum heldur til í sama bygningi, varð sett á stovn**

MÓTTØKA
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Eftir at hava hildið til í Lucas Debesargøtu í Havn í nøkur ár eru Kommunusamskipan Føroya og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya flutt í nýggj hølir í R.C. Effersøesøtu saman við Barnaverndarstovu Føroya.

Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavíkar kommunu, hevði eina framløgu har hann m.a. segði frá søguni um teir tríggjar stovnarnar, sum nú halda til í snotiligt innrættaðu húsunum í R.C. Effersøesgøtu, sum eru bygd um til endamálið. Jacob Vestergaard landsstýrismaður helt eisini røðu undir móttøkuni.

Kommunubólkurin, seinni býarfelagið, var stovnaður í 1992. Endamálið var fyrst og fremst at finna eina loysn á skuldarspurninginum hjá kommununum. Formaður var Páll Vang, borgarstjóri á Tvøroyri. Limir vóru borgarstjórar í størri kommununum.

Tað vóru góðu royndirnar av óformliga samstarvinum um býarfelagið, ið gjørdu, at Klaksvíkar og Runavíkar kommuna við Jógvani við Keldu og Jákupi Lamhauge á odda tóku stig til at skipa KSF, hetta var formliga uppá pláss í 1999. Havnin, Tvøroyri, Fuglafjørður og Vágur, sum eisini høvdu verið í býarfelagnum,A avgjørdu at fara við í KSF

Eitt av aðalmálunum var, at kommunurnar skuldu vera ein konstruktivur viðspælari í at smíða lógir og í øðrum samfelagsbroytingum. Eitt annað var at arbeiða fyri at fáa uppgávur og kvalifiseraði størv út til kommunurnar, og harvið menna øll økini kring landið.

Fysti skrivarin í KSF var Kári Thorsteinsson (2001-2002), síðan var tað Halla Hansen, ið var skrivstovufólk í 2002. Síðan 2003 hevur Ingibjørg Berg verið leiðari, og Bárður Larsen hevur verið settur sum løgfrøðisligur ráðgevi frá 2005.

Barnaverndarstova Føroya var stovnað í einum sáttmála millum kommunufeløgini. Formenninir í kommunufeløgunum hava evstu ábyrgd.

Kommunala arbeiðsgevarafelag Føroya varð sett á stovn við avtalu millum bæði kommunufeløgini. Felagið hevur egnar viðtøkur og sína egnu nevnd við trimum umboðum úr hvørjum felag. Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavn er formaður og Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági er næstformaður.

Rodmundur Nielsen endaði framløguna við at siga:“ Vit síggja okkum sjálvi sum viðspælarar í einum stórum samfelagsliði, har vit saman við landsmyndugleikum og øðrum felagsskapum arbeiða fram ímóti sama máli – At taka rættar avgerðir, so Føroyar verða eitt gott land hjá okkara fólki at búleikast í”.